# Talið á ófullførum fólki í Føroyum

(A Census of the Mentally Deficient in the Faroes).

Eftir *H. D. Joensen*.

Stórlond og smálond hava — umframt teir trupulleikar, ið tey eiga saman og sum altíð eru í einum samfelag — hvør sínar vansar at vinna á. Hjá stóra landinum kann tað vera yvirlitið, sum bilar og samskipanin. Hjá okkum, sum upp í smæstu tjóðirnar teljast, er vansin vanliga tann, at lítið mannfelag megnar ikki at skifta ymisku vandamálini sundur í so nógvar avmarkaðar bólkar, at hvør bólkurin sær fær ta serkønu viðgerð, sum fyri neyðuni kann vera. Lítla samfelagið noyðist tí ofta at lata sær eina málviðgerð lynda, sum stóra samfelagið hagreiðir øðrvísi. Satt er tað, í summum førum ber til at leita út um landamark, men ikki altíð, minni enn so.

Lata vit hesar hugleiðingar steðga lítið bil í heilsulag-num, finna vit sjálvandi aftur sama fyribrigdið. Enn í langar tíður fer at vera so her hjá okkum, hóast heilsu-lagið við serlæknum, sjúkradeildum, tólum o. ø. verður gjørt tíðarhóskandi eftir førimuni, at vit av og á koma fram á fólk, sum umstøðurnar ikki loyva okkum at hjálpa her á landi, men sum vit noyðast at senda burtur í størri lond, har sjáldsamastu sjúkurnar berast á nóg tíðum til, at hesi lond fáa rikið deildir við serkønum starvsfólki. Nóg mikið er at nevna sum dømi nývøxtur í heilanum, uttan onnur dømi eru sjálvandi eisini. Slíkum sjúklingum

krevst skjót og góð viðgerð, men sjúkralega teirra er vanliga – hon kann vera meir og minni drúgv – heldur stutt, so tað, at teir noyðast í onnur lond og eitt skifti koma at sakna næstingar og vinfólk, hevur lítið uppá seg, vigað upp ímóti tí, at besta nútíðar viðgerð stendur teimum í boði.

Heilt øðrvísi liggur alt fyri, venda vit okkum móti teimum av landum okkara, sum sjúkur og brek hava (t. d. mong av teimum sinnissjúku), ið taka seg uppaftur ferð eftir ferð hjá sama fólki, ella sum uttan íslit at kalla frá fyrsta degi, sjúkan tekur seg upp, halda á alt lívið, ja, viðhvørt (hugsað verður her um tey ófullføru[1])) vanliga merkja tey frá tí, tey síggja dagsins ljós, og til gravarbakkan. Í hesum førum ber ikki til – hóast so hevur verið gjørt leingi – bert at hugsa um tær viðgerðar- og røktingarvánir, sum okkum standa í boði í øðrum londum, men vit noyðast øll (bæði fólkavaldir menn, læknar og onnur, sum vald hava í hesum føri) samstundis og ikki í minni mun at hugsa okkum til og kenna á okkum, hvørjum vit sjálv høvdu tráað eftir, vóru vit tey, ið her

1) Í hesi ritgerð verða nýtt og annars skotin upp til læknaliga nýtslu hesi frøðiheiti: *ófullføri* fyri oligophrenia, og fyri tey trý ófullførisstigini: *fávitskut* (debilitas), *hálvbýtt* (imbecillitas) og *býtt* (idiotia). Lítið er at ivast í, at henda málnýtsla í fyrstu syftu fer at bjóða summum, eina mest teimum, sum verða av hjá teimum brekaðu, ímóti, og at skotin verða upp og kanska nýtt onnur heiti, ið fólk halda hava ikki mannminkandi dám. Tá er vert at hava í huga, at somu trupulleikar hava verið øllum málum fyri, og at royndirnar at føra inn onnur og linari orð nú allastaðni eru um at detta fyri bakka. Tí nýggju orðini vísa seg eftir fáum árum at fáa sama mannminkandi virði og verða tá einki mætari enn tey gomlu og upprunaligu í málinum. Teimum ófullføru lætta vit einki við slíkum fagurlæti, heldur eiga vit (sum tikið verður til t. d. í danska *Betænkning om aandssvageforsorgen*, nr. 204, Kphvn. 1958, bls. 39) at skapa virðing fyri hesum heitum og hvørki smæðast ella krógva burtur tey ella tey brekaðu, men leggja okkum eina við at hjálpa og stuðla hesum fólkum og veita teimum so góð og sámulig kor, sum vánir eru til.

av varðaðu. Tí tá koma í ljósmála — varin, lítillátin og tí kanska lítið eyðsýn — viðurskifti, ið nema við sárar kenslur: millum foreldur og børn, millum mans og konu og millum systkin, umframt tær at verða verðandi millum ókunnufólk, ið hava annað lyndi, tala aðra tungu og hava onnur áhugamál. Og fyri hann, ið kunnur er við umstøð-urnar hjá hesum sjúklingum og teimum, ið av varða, rennur skjótt fram, táið hann út í æsur kannar hetta mál, gamla ørindareglan: «duld eru døpur mein.» Tí hjá fjøldini av teimum brekaðu, ið her verður hugsað um (teimum sinnis-sjúku og teimum ófullføru) eru tað ikki vikur og mán-aðir um at tala, men heldur ár og viðhvørt ævuskeiðið alt.

Tí átti tað at ligið raðið fyri hjá teimum, sum vald hava, at virka fyri, at hesi duldu mein verða sum minnst. Og tí noyðast vit at royna at skipa so fyri her heima hjá okkum sjálvum, at tey, sum sjúk eru og sálarliga brekað, her á landi kunnu fáa ta viðgerð og røkt, sum teimum er fyri neyðini, so tey bert í hendingaføri noyðast út í onnur lond og tá helst bert styttri skifti. Fyri viðgerðina sjálva hevði hetta havt størsta týdning, og hava læknar borið hetta fram í meira enn øld (*Regenburg* 1849).

Skal á hesum øki í heilsulagnum metast um, hvussu vánirnar eru til at røkka á mál, má fyrsti setningurin verða hann at ætla um, hvussu víða hesi frávik frá tí rættvorðna (sinnissjúk og ófullfør) eru at finna hjá okkum Føroy-ingum, og um nóg nógv eru í hesum bólkum til, at tað verður gjørligt at gera sjúkra- og røktingardeildir við ser-kønum starvsfólki til hesi fólk.

Nakað síðan hava *Kristiansen* (1952) og *Rasmussen* (1953) roynt at kanna henda spurning teimum sinnissjúku við-víkjandi, og kom hin fyrri til tað úrslit, at á sinnissjúkra-deild í Føroyum áttu at vera rúm fyri ið hvussu er 80—100 sjúklingum, hin seinri fyri umleið 180 sjúklingum. Her skal ikki telvast um hetta tal, men serkøn nevnd[1]) hevur í 1956 mett talið til 150.

[1]) *Betænkning vedrørende statens sindssygevæsen*, nr. 165, Kphvn. 1956, bls. 135.

Eitt sinnissjúkrahús (ella ein sinnissjúkradeild) til 150 sjúklingar er, borið saman við tílíkar stovnar í øðrum londum, einki ovurstórt yrkisøki. Tí liggur tað raðið fyri at umhugsa: hevði tað ikki umframt borið til undir sama fyristøðumanni (yvirlækna) at leggja deildir til tey ófull= føru, teimum og øllum, ið her av varða, til lina. So nær skyldar eru hesar læknayrkisgreinir (hon, ið fæst við sinnis= sjúkur, og hon, ið fæst við ófullføri), at ikki skuldi staðist á at búgva út sama læknan so væl í báðum, at hann til lítar hevði rokkið um báðar hesar bólkar av sjúklingum og brekaðum.

Men um tey ófullføru her á landi — hvussu mong tey eru, og hvussu illa brekað, hava vit lítið higartil vitað. Setningurin verður í hesi ritgerð at fáa fast um at halda hesum spurningum viðvíkjandi.

## *Um tilfarið.*

Vanligt er, tá ið vit standa við eini fløkju, at hon rek= ist upp, bert vit fáa fatur á endarnar og lesa okkum hóv= liga eftir teimum.

Til at fáa tal á øllum ikki fullførum fólkum í Føroyum, tóktist tað høvundinum bestu hyggjuráðini at ganga tvær leiðir: A. At venda sær til læknar og sjúkrahús og spyrja um, hvussu nógv ófullfør fólk, hvør teirra vitsti um at siga, og B. At kanna alt skrivligt tilfar, sum var til skjals um ófullfør fólk á ymiskum umsitingarskrivstovum. — Var alt hetta tilfar gjølla kannað, handfarið og mett av sama manni, kundu vónir vera til, at úrslitið fór at vera álít= andi, ið hvussu er nóg álítandi til at lýsa hin setta spurn= ingin.

A. Spurnarbløð vóru send til allar kommunulæknar og teir tríggjar yvirlæknarnar við vanlig sjúkrahús her í Føroyum, men umframt vóru spurnarbløð latin aðalumsitingini fyri ófullfør á donsku oyggjunum at býta út til fyristøðulæknarnar við tey ófullførishús og =heim, sum ófullfør fólk úr Føroyum koma í, táið tey fara av landinum. Í hesum

spurnarblaði, sum landslæknin sendi út 1. marts 1958, var setningurin fyrst avmarkaður til at røkka um *tey* ófullføru, sum vóru *so vitskulítil*, *at teimum í løtuni tørvaði ella í næstu framtíð mundi fara at tørva* stuðul frá samfelagnum, so tey annað hvørt longu vóru komin ella áttu at koma undir einahvørja umsorgan, kanska at búgva á hóskandi ófullførishúsi ella -heimi. Og síðani var á oyðublaðnum spurt um ymist viðvíkjandi hvørjum ófullførum sær, eitt nú: navn, føðingardagur og -ár, fyri børn navn á foreldrum, fyri vaxin navn á og skyldskapur við tey, hin ófullføri búði hjá, bústaður, ein meting av, *hvussu* ófull-førur hin brekaði var (fávitskutur, hálvbýttur ella býttur), læknaligar viðmerkingar (táið tað var gjørligt so sjúkuavgerð, t. d. mongolismus, myxoedema, hydrocephalus, para- ella hemiplegia spastica, epilepsia). Aftrat hesum helst ein lýsing av standinum (t. d. ikki reinførur, illur í sær, góður at fáast við, sámuligur, gongur við mannfólki og býður sær til, rekavætti, landastrok), stutt lýsing av hússetrinum (tí mangan verður *tað tað, ið* ger *tað eftirynskjandi at fáa hin brekaða á ófull-førishús*), hvussu hin brekaði higartil hevur verið hjálptur (komin undir ófullførisumsorgan, farin av landinum í ófullførishús ella -heim, farin á sjúkrahús, kanska sjúkraheim ella ellisheim), um hann hevur fingið avlamisstyrk ella er komin í eftirlitna heimarøkt (heima ella úti hjá fólki) — og loksins varð biðið um uppskot til, hvussu frægast mundi verið at skipa fyri í framtíðini (fyri konufólk kanska ófrukting). Her vóru læknar biðnir um at taka støðu eina mest til, um hin ófull-føri framvegis kundi ætlast at verða væl farin við at verða búgvandi heima ella úti hjá fólki, *ella* um hann heldur átti at búgva á ófull-førishúsi ella -heimi. Og spurt varð í hesum føri um, hvørt tey, ið varðaðu av, bóru seg undan (ella beinleiðis sýttu fyri), at nakað slíkt varð gjørt, og um tey, hevði slíkt hús ella heim verið her í Føroyum, fegnari vildu latið hin ófullføra har enn at hava hann heima. Læknar vóru biðnir um, har fleiri vóru í somu bygd, at samráðast um spurn-ingarnar, og teir, sum høvdu ikki verið leingi í læknadøminum, vóru biðnir um at samráðast við og spyrja seg fyri hjá kunnigum fólki, eitt nú prestum, sýslumonnum, lærarum og sóknarstýrislimum.

B. Táið hesi spurnarbløð vóru send út, fór høvundurin undir at vita, hvussu mong ófullfør vóru at finna í teimum nógvu sjúkradagbókum (tilsamans einar 2200), sum eru í varðveitslu hjá Føroya vanlukkuráði, eins og hann kannaði øll søvn, ið til eru, og øll mál, ið handfarin høvdu verið hjá ríkisumboðnum viðvíkjandi almennari hjálp til ferða-útreiðslur úr Føroyum, sjúklingum undir serumsorgan o. m.

Øll at kalla, sum fyrispurningar vóru sendir til, hava sera beinasom latið frá sær tað, ið tey vitstu[1]). Alt tilfarið kom sjálvandi ikki at vera

1) Eg veiti her øllum, serstakliga landssjúkrahúsinum og teimum læknunum, ið svaraðu aftur, men eisini øllum teimum úti á bygd, sum hjálpt hava læknunum og mær við hesum kanningum, bestu tøkk mína fyri hjálpina.

javnt til dygdar, og svørini øll ikki jøvn til lítar. Úr einstøkum læknadømum vóru eingi svør ella heilt fáorðaðar lýsingar, men atvoldirnar hava mest verið tær, at læknarnir hava verið nýkomnir ella so ovbyrjaðir við øðrum arbeiði, at teir hava ikki havt nóg góðar stundir. Tey spurnarbløð, sum ikki eru afturkomin, ella sum lítið stóð á, hava kortini valla (at tey voldu meira stríð skerst ikki burtur) gjørt kanningarúrslitinum stórvegis mun. Tí tey rúgvismiklu svørini frá landssjúkrahúsinum, ið nomu við allar vitskulítlar sjúklingar eini 30 ár aftur í tíðina, sum vóru lagdir inn har vegna hesi brek, ella sum umframt aðrar sjúkur eisini høvdi hesi brek, og kanning høvundsins av øllum tilfari, sum var at finna í umsitingini, komu at skapa eitt so trygt støði, at tað bar til, táið høvundurin spurdi seg fyri hjá lærarum og øðrum kunnigum fólki úti á bygd, at fullfíggja lýsingarnar, skilja frá tey deyðu og fáa mett umstøðurnar, sum tær í allar mátar nú vóru.

Áðrenn farið verður út í æsur við sjálvum tilfarinum, verður neyðugt at gera hesar viðmerkingar aftrat.

Aðalendamálið var, sum longu nevnt, at fáa tal á teimum ófullføru, sum nú ella í næstu framtíð hava onkra hjálp fyri neyðini. Dentur hevur tí verið lagdur á, táið endalig uppgerð av tí fingna tilfarinum fór fram, bert at fáa uppí hesa teljing rættuliga ófullfør fólk (t. e. debilitas, imbecillitas og idiotia), men sibbarnir eru við vilja ikki tiknir uppí part, hóast onkur kundi sagt, at heldur ikki teir eru rættuliga fullførir. Hetta er gjørt av trimum atvoldum. Fyrsta er tann, at ikki er siður í norðurlondum at telja teir uppí ófullfør. Onnur er tann, at í mongum førum er samfelag okkara (mest úti á bygd), tað ið arbeiðishættum viðvíkur, enn so toluliga einfalt, at tornom fólk, bert ikki ov nógv verður lagt fyri tey og ov mikið skundað undir tey, so toluliga hanga uppi millum manna, ja, viðhvørt skarða framúr í styrki og — verður væl farið við teimum — eisini í tolni og áhaldni, og tí hava tey enn, táið arbeiði er, nógmikið fyri báðar hendur. Men triðja atvoldin er tann, og hon er mest umráðandi, at tóku vit sibbarnar uppí teljing sum hesa, er einki at ivast í, at úrslitið hevði verið sum best ber til og hevði givið heilt skeiva mynd av hesum viðurskiftum. At telja sibbarnar

gerst ikki av læknaávum, men lærararnir mugu, aftaná at teir hava fingið leiðbeining, í fyrstu syftu telja teir. Og úrslitini úr slíkari teljing mugu so seinri gjølla kannast og greinast, áðrenn hvør taldur tilburður verður endaliga flokkaður og settur í beinan bólk. Henda setning kunnu hóskandi tey seta sær, sum fáa um hendur føroysku ófullførisumsorganina í komandi árum.

Tilfarið er skift sundur í fávitskut (debilitas), hálvbýtt (imbecillitas) og býtt (idiotia) á vanligan hátt, og við teirri avmarking, sum flestu lond nýta, táið roynt verður at flokka vitskulítil fólk. Viðhvørt hevur tað verið trupult — og hetta er eisini at siga um tey, sum hava verið ella enn eru á ófullførishúsi — ja, at siga ógjørligt við vissu at gera av ófullførisstigið. Men tað skal viðmerkjast, at flokkingin, sum høvundurin hevur gjørt av teimum ófullføru í trý stigini, tykist at vera rættuliga trygg og álítandi. Tí at kalla í øllum førum hevur henda meting samsvara teirri meting, sum serkønir hava gjørt av teimum brekaðu, ið eru ella hava verið á ófullførishúsi, hóast hesar metingar eru gjørdar, uttan at hvør hevur vitað av øðrum.

Enn er at leggja aftrat, at, táið slík teljing fer fram, verða altíð ivatilburðir, ið standa og rilla á markinum inn í onnur sálarlig frábrigdi. Slíkir tilburðir — nógvir eru teir ikki — hava sjálvandi eisini verið her. At nevna eru t. d. gomul fólk við arteriosclerosu ella við eftirsjúkum av líkfalli (fólki, sum fyrr hevur gingist væl, sum kanska eru gift og búgva hjá sínum), sjúklingar, har tað er eyðsýnt, at teir eru svakir ella eisini í stóran mun murubrekaðir (tilburðir, har tey sjúku, rætt er tað, eru vorðin meir og minni til afturs eisini vitskuni viðvíkjandi, men har kortini illa ber til at siga teir at vera «ófullførar», tí hetta meinið er ikki tað, ið bilar mest). Slíkir tilburðir — avmarkingin verður sjálvandi altíð nakað eftir ætli — eru ikki tiknir uppí hesa teljing. Børn við hemi- ella paraparesis spastica, børn við líkfalli og við øðrum sjáldsomum heilabrekum eru kortini tald uppí í teimum førum, har tað var skilligt, at tey *eisini*

vóru ófullfør. Her skal verða lagt aftrat, at tey — heilt fáu — ófullføru, ið eisini vóru so munandi sinnissjúk, at tey í mong ár høvdu verið og enn vóru á sinnissjúkrahúsi, ikki eru tald uppí.

Alt tilfarið varð so av høvundinum, aftaná at hann sum omanfyri greitt frá, hevði skilt frá tað, sum ikki átti at verða talt uppí, handfarið á tann hátt, at allar umráðandi lýsingar vóru drignar út úr og settar upp í stóra yvirlitstalvu, sum kom at fevna um øll ræ̈ttiliga ófullfør, sum nakar vitsti um, her í Føroyum, skipað eftir heimbygd.[1])

## *Úrtøka.*

Kanna vit nú tað tilfarið, sum eftir verður, og sum fevnir um øll ófullfør fólk sum heimarætt áttu í Føroyum hin 31.12.1958, fáa vit tilsamans 179 ófullfør, 94 mannfólk og 85 konufólk. Fólkatalið í Føroyum sama dag sigur landsfólkayvirlitið at hava verið 34.296, t. v. s. at 0,52 % av øllum fólkum her á landi eru ófullfør. Skift eftir kyni hóskar hetta toluliga væl saman við samsetingini av føroysku tjóðini, ið er umleið 82 mannfólk uppá hvørji 77 konufólk (Manntalið 31.12.1950).

Talið 0,52 % er ikki høgt tal, borið saman við grannalond okkara, og tykist ikki at vera hægri enn í teimum. Men illt er at meta um hetta, tí hvørki úr Íslandi, Noregi ella Danmørk eru tøk tøl, ið beinleiðis kunnu berast saman við teljing okkara, men eru tøl teirra annaðhvørt bert eftir ætli ella fevna tey um rúm, hesi lond hava á ófullførishúsum, og um talið á teimum, sum eru undir onkrari ófullførisumsorgan.[2]) Vit kundu hugsað okkum, at talið í

---

1) Henda talva verður sjálvandi ikki gjørd almanna kunnig, men tey, ið vísindaliga ella í aðrar mátar fáast við hesar spurningar, kunnu hjá landslæknanum sleppa framat hesum tilfari.

2) Sí *Heilbrigðisskýrslur* 1955, Reykjv. 1958, bls. 167, *Sunnhetstilstanden og medisinalforholdene* 1955, Oslo 1958, bls. 9 og *Medicinalberetning for kongeriget Danmark 1956*, II, Kphvn. 1958, bls. 38.

Føroyum fór at vera væl hægri enn í størri samfeløgum, av tí at arvaligu ílegurnar her hjá okkum hava minni rása-rúm. Men í hesum sambandi skal vart verða gjørt við, at eingin av teimum tilkomnu ófullføru her í Føroyum var giftur. Sostatt tykjast vit her á landi — í nýggjari tíð ið hvussu er — at vera sloppin undan tí mikla vansa, sum ikki er ókendur í øðrum londum, at tey ófullføru leita saman í hjúnarløg, sum í miklan mun bera ílegurnar longur áleiðis. Leggja ung ástir saman, verður valla hugsað um arvaligar ílegur, og hóast sinnissjúka kann vera í ættini, verður iva-leyst litið á — hevur hon ikki longu tikið seg upp — at vandin er lítil. Men ófullføri er at kalla altíð skilligt frá ungbarnaaldri. Hetta tykist at vera ein atvoldin til, at talið á ófullførum er ikki hægri í Føroyum eins og talið á sinnis-sjúkum, sum *Rasmussen* (1953) hevur funnið. Men at tað altíð er onkur, sum dugir sær ikki hógv, skilja vit, táið vit í tilfarinum finna, at 7 av tilkomnu ófullføru konu-fólkunum hava átt eitt ella fleiri leysingarbørn.

Í hesi kanning verður ikki vitað eftir sambandi teirra ófullføru við bygdir og oyggjar, t. e. um munur er á fyri-komingini ymsa staðni í Føroyum. Tí slík kanning kann illa hugsast at geva stórvegis úrslit, uttan so at hon eisini fer út í æsur við skyldskaparviðurskiftum teirra ófullføru. Seinri árini er so nógv fólk flutt av smærri bygdum til summar stórbygdir, at ansast má gjølla eftir hesum, áðrenn nakað verður sagt um hesar spurningar. Kortini er tað heilt skilligt hjá honum, ið lesur yvirlitstalvuna, at tey ófullføru eru trunkað saman í ávísum bygdum ella bygda-løgum, og at í summum — viðhvørt heilt stórum — bygd-um eru fá ella eingi at finna. Hetta tykist at benda á — undra kann tað ongan — at summar ættir eru fongdar við hesum brekum. Kanska tilfarið kann seinri verða nýtt til støði undir gjøllari kanning av hesum viðurskiftum.

Aldursskipan teirra ófullføru sæst á 1. talvu. Henda aldursskipan er ikki hin sama sum í føroysku tjóðini annars, ið skipað í somu bólkar (manntalið 31.12.1950)

*1. talva.* Tey ófullføru, skipað eftir aldri
(Division of the mentally deficient according to age).

| | |
|---|---|
| undir 7 ár | 10 |
| 7–14 ár | 33 |
| yvir 14 ár | 136 |
| Tilsamans (Total) | 179 |

gevur lutfallið umleið 1:1:4. Í tí fingna tilfarinum skuldi tá bert umleið 1/3 av teimum ófullføru børnunum undir 7 ár, sum til eru í Føroyum, verið komin uppí, og hetta er kanska ikki óhugsandi. Fyrsta hugskotið, tú fært (og iva-leyst er tað so), er tað, at foreldur sum longst ugga seg við, at barn, ið er aftarlaga, fer at taka seg fram, og venda sær tí ikki til lækna. Fyrstani, tá ið barnið eigur at fara ella fer í skúla, kemur brekið reiðuliga í ljósmála. Hesin skeiv-leikin — eru ikki aðrar atvoldir til hann — sigur okkum, at líkt er til, at eini 20 ófullfør børn eru aftrat úti um landið, sum vit enn einki vita um fyri vist.

Í 2. talvu er tilfarið skipað eftir ófullførisstigi. Her er í øllum ivaførum, og har metingin rillar úr einum stigi í annað, linasta metingin nýtt (í klombrum aftaná eru millum-partaførini viðmerkt).

*2. talva.* Tilfarið, skipað eftir ófullførisstigi
(Division of material according to degree of mental deficiency).

| | | |
|---|---|---|
| Fávitskut (moronity) | 44 | (av hesum 17 fávitskut til hálvbýtt) |
| Hálvbýtt (imbecillity) | 98 | (av hesum 15 hálvbýtt til býtt) |
| Býtt (idiocy) | 37 | |
| Tilsamans (Total) | 179 | |

Lítið skal her verða sagt um atvoldirnar til ófullføri, eina mest tí alt tilfarið er ikki nóg væl kannað í so máta. Ein roynd er kortini gjørd á 3. talvu, og fellur úrslitið væl í lag við tað, sum funnið er aðrastaðni í heimi. Í 119

førum tóktist eingin eyðsýn atvold at vera ella hava verið til brekið. Sjálvandi kunna hjá møðrunum, meðan tær vóru við barn, og hjá børnunum, meðan tey vóru heilt ung, óansaðar sjúkur hava gjørt um seg, men einki er í lýsingunum sagt frá hesum. Mong av teimum ófullføru í bólkinum uttan kenda atvold hava andlitsskap, limalag og viðføddar avskapingar, ið vanliga eru at finna hjá ófullførum fólki í øðrum londum. Ivaleyst eru í hesum stóra bólki at finna ein rúgva av teimum ófullføru, har arvaligar ílegur gera um seg. Næststørsti, men nógv minni bólkurin er mongolismus við 21 tilburðum, men annars eru ongar viðmerkingar at gera til talvuna.

Í 4. talvu er tilfarið skipað í aldursbólkar og eftir heimbýli. Í talvuni er eisini skilað til, hvar hin ófullføri má haldast at vera best skikkaður at vera nú ella í næstu framtíð. Metingin av hesum seinasta, sera umráðandi ivamáli er fyri tey ófullføru, sum eru at vera á ófullførishúsi ella -heimi, gjørd av læknunum har. Men fyri tey ófullføru, sum í Føroyum eru, hevur høvundurin mett um hetta í samráð við lækna hins brekaða í hvørjum einstakum føri, og hetta er gjørt við at viga upp brekið móti øllum umstøðum, sum kendar vóru. Summi av teimum, ið av varða, vísa frá sær alla uppílegging frá tí almenna, men mong eru eisini tey, sum siga seg ikki vilja senda hin ófullføra heiman, so leingi tey orka at stríðast við hann ella hana, men hevði í Føroyum verið ófullførishús ella -heim, so høvdu tey fegin latið tey har. Tí tá slappst altíð at vitja, og tey mistu tey ikki með alla. Avvarðandi hjá 10 søgdu beinleiðis so, men tað sæst, at hetta lá á tunguni hjá nógv fleiri.

Á hesi talvu sæst, at 68 fólk úr Føroyum í løtuni eru í Danmørk á onkrum ófullførishúsi (ella -heimi). Táið hetta talið ikki er heilt tað sama, sum tað, ið fingið er frá ófullførisumsitinginí, stendst hetta av, at komin eru í ljósmála við hesum kanningum nøkur fá, sum eru á heimum, ið ikki standa undir hesi umsiting.

3. *talva.* Tilfarið skipað eftir atvoldum til ófullføri,
+ fávitskut, ++ hálvbýtt, +++ býtt.
*(Division of the mentally deficient according to the underlying causes.
+ moronity, ++ imbecility, +++ idiocy).*

| Atvoldir (Causes) | | Mannfólk (Males) | Konufólk (Females) | Tilsamans (Total) |
|---|---|---|---|---|
| Eingin kend atvold (Causes unknown) | + | 13 | 13 | 26 |
| | ++ | 39 | 39 | 78 |
| | +++ | 10 | 5 | 15 |
| Mongolismus | + | 1 | 1 | 2 |
| | ++ | 3 | 6 | 9 |
| | +++ | 7 | 3 | 10 |
| Para(hemi)paresis spastica | + | 4 | 1 | 5 |
| | ++ | 2 | 1 | 3 |
| | +++ | 1 | | 1 |
| Epilepsia | + | 1 | 1 | 2 |
| | ++ | 2 | 2 | 4 |
| | +++ | 2 | | 2 |
| Hydrocephalus | + | | | |
| | ++ | 1 | 3 | 4 |
| | +++ | 1 | 1 | 2 |
| Encephalit. epid. chr. | + | 2 | 1 | 3 |
| | ++ | 1 | | 1 |
| | +++ | | | |
| Syndroma Laurence-Moon -Biedl | + | 1 | 2 | 3 |
| | ++ | 1 | | 1 |
| | +++ | | | |
| Myxoedema cong. | + | | 2 | 2 |
| | ++ | 1 | | 1 |
| | +++ | | | |
| Microcephalia | + | | | |
| | ++ | | 1 | 1 |
| | +++ | | 2 | 2 |
| Nanismus | + | | 1 | 1 |
| | ++ | | | |
| | +++ | | | |
| Trauma capitis | + | | | |
| | ++ | | | |
| | +++ | 1 | | 1 |
| Tilsamans *(Total)* .................. | | 94 | 85 | 179 |

*4. talva.* Tilfarið skipað í aldursbólkar og eftir heimbýli.
*(Division of the mentally deficient according to age and residence)*[1].

| Eru í løtuni (Residence at present) | undir 7 ár | 7—14 ár | yvir 14 ár | Tils. (Total) |
|---|---|---|---|---|
| Á ófullførishúsi *(In homes for the mentally deficient)* | 5 | 21 | 42 | 68 |
| Hiðani skikkað til *(From here fit for)*: | | | | |
| eftirlitna heimarøkt *(Supervised family nursing)* | | 1 | 3 | 4 |
| sjúkraheim *(Nursing home)* | | 1 | 6 | 7 |
| kostskúla *(Boarding school)* | | 2 | | 2 |
| Heima ella úti hjá fólki *(At home or in the home of other people)*: | | | | |
| við avlamisstyrki ella í eftirlitnari heimarøkt *(with grants from public funds)* | | 2 | 84 | 86 |
| í fyribils umsorgan *(waiting for admission* | 1 | | | 1 |
| Hiðani skikkað til ófullførishús *(From here fit for home for the mentally deficient)* | 1 | | 21 | **22** |
| Heima ella úti hjá fólki, men avvarðandi ongantíð vent sær til hitt almenna *(At home or in the home of other people, but out of contact with the public authorities)* | 4 | 10 | 10 | 24 |
| Hiðani skikkað til *(From her fit for)*: | | | | |
| eftirlitna heimarøkt *(Supervised family nursing)* | | 1 | 4 | 5 |
| ófullførishús *(Home for the mentally deficient* | 4 | 7 | 2 | **13** |
| Tilsamans *(Total)* | 10 | 33 | 136 | 179 |

1) Tilfarið varð liðugt um Ólavsvøku 1958 og tá skipað í bólkar. Í hesi talvu er allastaðni rættað, táið broytingar hava verið viðvíkjandi heimbýli og øðrum áðrenn 31.12.1958. Men nýggj uppgerð eftir aldri er ikki gjørd fyri hesar 4 mánaðirnar, ið gera bert heilt lítlan mun.

87 fólk eru heima ella summi teirra úti hjá fólki her í Føroyum og hava fingið avlamisstyrk ella eru í eftirlitnari heimarøkt, so sum henda verður givin og nýtt her á landi. Av hesum 87 er 1 barn, ið er komið undir ófullførisumsorgan, men sum í løtuni er undir «fyribils umsorgan» (t. e. bíðar heima eftir hóskandi býli á onkrum ófullførishúsi ella -heimi). Men aftrat hesum 155 eru í Føroyum ið hvussu er 24 ófullfør fólk, sum búgva heima ella úti hjá fólki, og sum ongantíð hava vent sær til tað almenna.

Viðvíkjandi teimum 68, sum í løtuni eru á ófullførishúsi, verður sagt av læknunum har, at tey 4 eru so skikkað, at tey hóska í eftirlitnari heimarøkt, tey 7 til okkurt sjúkraheim og tey 2 til onkran kostskúla fyri slík fólk.

Eisini sæst á talvuni, at av teimum 87, sum fáa einhvønn almennan stuðul, eru tey 22 so skikkað, at tey hóska best á ófullførishúsið. 1 teirra er undir fyribils umsorgan, hini 21 eru fólk yvir 14 ár, sum eru heima ella úti hjá fólki, men um tey er at siga, at tey annaðhvørt beinan vegin ella í næstu framtíð áttu at farið á ófullførishús. Teirra millum eru at finna *tey* ófullføru, har tey, ið av varða, ikki á nakran hátt fáa seg til at senda tey av landinum, men har tað hevði verið teimum ein lætti (viðhvørt ein lætti, sum hann, ið ikki varðar av, lítið er førur fyri at skilja), kom eitt ófullførishús her í Føroyum, so tey av og á sluppu at vitja hin ófullføra har. Eisini eru í hesum bólki at finna ófullfør fólk, sum áður hava verið í góðum hondum hjá foreldrum ella øðrum næstingum, men har hesir nú annaðhvørt eru deyðir ella so gamlir og ússaligir, at teir orka ikki longur at stríðast við tann ófullføra. Og eingi líkindi tykjast at vera til, at hesi ófullføru fara at verða nóg sámuliga viðfarin av øðrum. Vit nerta her við eitt sera erkvisið øki, sum illt er at skriva um almennt, men tey, ið eru eitt sindur kunn við hesi viðurskifti, munnu hava ein illgruna av kortini, at alt er ikki so tespiligt undir skræðuni hesum 87 viðvíkjandi, sum samfelagið sigur seg at hava tikið inn at sær. Tí ikki eigur tað at verða

gloymt, at fjøldin av hesum ófullføru, ið avlamisstyrk fáa, valla lúka treytirnar fyri at koma í sjúkrakassa. Táið tey kortini eru komin har, er tað sjálvandi tí, at hetta – sum er – er einasta gongda leiðin at hjálpa. Men samstundis gleppa tey samfelagnum úr hendi eftirlitið viðvíkjandi. Og hann, ið kennir umstøður teirra, veit, at ikki eru tey øll nóg væl fyri komin, sum er, minni enn so. Líkt er til, at *nakað* av andstøðuni ímóti at lata tey ófullføru heiman, stavar frá tí peningamissi, sum fólk undir annars trongum korum høvdu verið fyri, steðgaði avlamisstyrkurin ella gjaldið fyri eftirlitnu heimarøktina, av tí at hin ófullføri kom á tað hús ella heim, *honum sjálvum* hóskaði best. Annars skal í hesi ritgerð einki verða gjørt burtur úr, hvussu ymsir partar av umsitingini taka lut í hesum gjøldum.[1])

Eingin ivi kann vera í, at 13 av teimum 24 ófullføru, sum eru at vera heima ella úti hjá fólki og uttan nakað samband við tað almenna, vóru betri fyrikomin, komu tey á ófullførishús. Hjá teimum 11 undir 14 ár er tað hugsandi, at tey nýttust bert at vera har eitt styttri ella longri skifti (nøkur ár), so tey vóru gjølla kannað og fingu høvi til at læra okkurt og síðani komu í eftirlitna heimarøkt. Men hjá teimum 2 yvir 14 ár verður tað ætlandi með alla.

Setningur okkara var: hvussu stórt ófullførishús er tørvur á her í Føroyum, táið endamálið er, at mest sum øll ófullfør fólk hjá okkum – tey sum nú eru burtur í øðrum landi, og tey, sum enn eru her heima – skulu fáa røkt, hóskandi viðgerð og læru her á landi? Svarið er at lesa í 5. talvu, har eisini tey heilt fáu eru tikin uppí, sum ófullførisumsorganin hevur hildið vera skikkað til eftirlitna heimarøkt, sjúkraheim ella kostskúla. Og í 6. talvu eru hesi fólk skipað eftir aldri.

---

[1]) Hann, ið áhuga hevur fyri hesum, verður vístur til tað, sum høvundurin hevur skrivað um hetta í: *Betænkning om aandssvageforsorgen*, nr. 204, Kphvn. 1958, bls. 248. Viðurskiftini eru bert lítið broytt, síðan tað varð skrivað.

5. *talva.* Støddin á einum ófullførishúsi í Føroyum.
(Accomodation of a home for the mentally deficient in the Faroes)

| | | |
|---|---|---|
| Í løtuni eru á ófullførishúsi *(At present in homes for the mentally deficient)* | | 68 |
| Skikkað til ófullførishús *(Others fit for such homes)* | 22+13 | 35 |
| Tilsamans *(Total)* | | 103 |

6. *talva.* Somu fólk sum í 5. talvu, skipað eftir aldri.
(The persons in table 5, divided according to age)

| | |
|---|---|
| undir 7 ár | 10 |
| 7–14 ár | 28 |
| yvir 14 ár | 65 |
| Tilsamans *(Total)* | 103 |

Teljingin hevur so statt víst okkum, at á føroyskum ófull-førishúsi (ella -heimi) eigur í løtuni at vera rúm fyri umleið 100 fólkum. Tá er ikki lagt út fyri fyri fólkavøxturin, og heldur ikki fyri tey umleið 20, sum kanska í minnsta lagi eru eftir, og sum henda teljing hóast nærlagni hevur ikki fingið uppí. Ov stór verður tílík deild valla, fær hon rúm fyri 100, men fyri fyrst má hon haldast at vera nóg stór, tí á hin bógvin verða ivaleyst altíð nøkur, ið nú so leingi hava verið burtur, at lítið og einki samband kann sigast at vera longur við upprunaheimið. Lítil góðgerð er at flyta heim slík fólk, dámar teimum nú væl, har tey eru.

Men havt má vera í huga, at táið slíkt hús ella heim er komið her í Føroyum, fer andstøðan ímóti at lata tey ófullføru heiman skjótt at minnka. Og tí má beinan vegin skipast so fyri, at vaxast kann um hesa deild, táið tørvur verður á meira rúmi. Líkt er til, at so verður skjótt.

## SUMMARY

The present work is a census of all the mentally deficient (i. e. exclusive of retarded persons) in the Faroes, both those in homes (in Denmark) for the mentally deficient and those outside, whether placed under some form of welfare or not. The census shows that at the end of 1958 there were in the Faroese population (1958: 34,296 inhabitants) 179 mentally deficient in all, or 0.52 per 100 inhabitants, 94 men, and 85 women. Out of these, 44 were to be characterized as mentally deficient in the mildest degree (morons), 98 mentally deficient in the medium degree (imbeciles), and 37 mentally deficient in the most extreme degree (idiots). None of them were married. The division of the mentally deficient according to age, degree, and residence appears from the tables 1, 2, and 4, according to the underlying causes of mental deficiency from the table 3. 68 were in homes (in Denmark) for the mentally deficient, but further 35 were in urgent need of being removed to such homes. Presumably a small number of persons (on a rough estimate about 20) have been overlooked in this census. — Therefore, the first time, a home for the mentally deficient in the Faroes ought to have accomodation for at least about 100 inmates.

## BÓKMENTIR

*1.* Betænkning afgivet af kommissionen af 29. marts 1952 vedrørende Statens sindssygevæsen. Betænkning nr. 165. Kphvn. 1956.

*2.* Betænkning om aandssvageforsorgen afgivet af det af socialministeriet den 30. april 1954 nedsatte udvalg til behandling af aandssvageforsorgens problemer. Betænkning nr. 204. Kphvn. 1958.

3. Heilbrigðisskýrslur (Public Health in Iceland) 1955. Reykjv. 1958.

4. *Kristiansen, E. S.:* Om hospitalisering af psykiatriske patienter paa Færøerne. Ugesk. f. læger *114*:986, 1952.

5. Medicinalberetning for kongeriget Danmark 1956, II. Kphvn. 1958.

6. *Rasmussen, R. K.:* Om sindssyge og sindssygehospital paa Færøerne. Ugesk. f. læger *115*:1035, 1953.

7. *Regenburg, C.:* Sindssygdomme paa Færøerne. Det kongelige sundhedskollegiums forhandlinger for aaret 1848. Kphvn. 1849, bls. 41.

8. Norges offisielle statistikk XI 306. Sunnhetstilstanden og medisinalforholdene 1955. 103. aarg. Oslo 1958.